# Mentanargrunnur Landsins

## Starvslønir til listaligt og mentanarligt arbeiði

Starvslønir verða latnar umsøkjarum við støði í listaligum og fakligum metingum av verkevni ella verkætlan.

**Endamál grunsins er at styðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum. Grunnurin skal serliga stuðla tiltøkum og verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, sum kann javnmetast við hesar listagreinir.**

Starvslønirnar kunnu verða latnar soleiðis:
1 starvsløn galdandi í 3 ár
2 starvslønir galdandi í 1 ár
Starvslønir galdandi í 1 til 6 mánaðir

Upphæddin á starvslønini svarar til læraralønina á fólkaskúlans lønarstig 21, stig 1, sum í dag er kr. 18.470,77 um mánaðin.

Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 15. februar 2002

**Umsóknarbløð fáast frá Mentanargrunni Landsins**
Tórgarðsgøtu 42 - FO-100 Tórshavn
Tlf. 32 08 42 - fartlf. 21 80 13 - fax 31 19 98 - teldupostur: mentan@post.olivant.fo

# M/b »Ægir« til sølu!

M/b »Ægir« verður við hesum lýstur til sølu.

Báturin hevur skaða, eftir at hava siglt á land, og skal yvirtakast soleiðis sum hann nú er og liggur uttan veiðu- og fiskiloyvi.

Áhugað kunnu venda sær til

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 · Box 359 · FO–110
Tórshavn · Tlf. 311260 · Fax 311261
e-mail: advfelag@post.olivant.fo

Tormóður Djurhuus, adv. — Jógvan Páll Lassen, adv.
Petur Even Djurhuus, adv. — Jógvan E. Ellefsen, adv.
Ingi Højgaard, adv — Anna Dam, adv.

# Útbjóðing

Sumbiar kommuna bjóðar hervið út arbeiði at flyta 20.000 rúmmetrar av gróti frá grótdunganum á Lopranseiði oman í Ónavík, har tað skal leggjast út til havnaøkið.

Boðini skulu verða Sumbiar kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 28. januar 2002 kl. 1800.

Fleiri upplýsingar um arbeiði kunnu fáast við at venda sær til Sumbiar kommunu á telefon 224894.

Kommunustýrið skilar sær rætt til at velja millum innkomnu tilboðini ella havna øllum.

**Sumbiar Kommuna**
FO-970 Sumba
Tlf. +298 370344
Fax +298 370114

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Kunngerð

1. februar 2002 byrjar 9. kommunulæknin í Suðurstreymoyar læknadømi, Kári Jacobsen í viðtaluhølunum í J. Paturssonargøtu 22.

Avgreiðslutíðirnar verða hesar:

kl. 8.00 til 9.00 telefonviðtala við læknan
kl. 9.00 til 12.00 telefonviðtala við skrivaran
kl. 9.00 til 16.00 viðtala sambært avtalu

Telefon 313700. Fax 313702

SNARSKIVAN

# Pedagogar/ Hjálparfólk

Søkt verður eftir fýra pedagogum, tveir 40 t. um vikuna, ein 30 t. um vikuna, ein 29 t. um vikuna, at byrja 1. mars 2002.

Lønar- og setanarviðurskiftir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið, lønt í lønarflokki 11/13.

Eisini søkja vit eftir einum hjálparfólki 20 t. um vikuna, at byrja 15. februar 2002, og eftir einum avloysara fyri hjálparfólk 20 t. um vikuna í eitt ár, at byrja 15. februar 2002.

Lønar- og setanarviðurskiftir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið, lønt í lønarflokki 5/6.

Barnagarðurin er ein sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er at hava umsorgan fyri børnum í aldrinum 0 til 7 ár og á einum kristnum støði at menna tey í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan hátt.

Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Vit vænta, at tú saman við okkum skapar eitt gott umhvørvi á stovninum.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 3. februar 2002.

Meira fæst at vita við at tosa við leiðaran á tlf. 455557 lokal 10.

**Dr. Margrethu Barnagarður**
Gerðagøta
FO-700 Klaksvík

# Skrivstovufólk

Søkt verður eftir fólki við útbúgving til skrivstovu okkara skjótast tilber.

Umsókn verður at senda til:

**Sp/f Valdemar Lützen**
Skálatrøð
Postboks 20
110 Tórshavn

# Í kvøld

18. januar á Café Natúr
(til og við sunnudagin 20. januar)



**Brian Young**

framførir tónleik frá 60 unum - 90 ini líka frá:

The Beatles og Creedence Clearwater Revival til Bob Dylan, van Morrison, Crowded House osv.

*livandi tónleikur*

CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25

# Fólk søkist

til fastar reingeringsuppgávur, dag og kvøld, í Tórshavn (gjarna venindir), at byrja beinanvegin.

Hevur hetta áhuga, vinarliga ringið til Jóannes á tlf. 211312.

**Vaskarí & Reingering**

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg



# Vesturbúgvin landaði í Vestmanna

*Væntandi koma Grønanes og Vesturtúgvan inn at landa mánadagin, og roknast kann við, at fiskurin hjá Grønanesi endar í Vestmanna*



## Væntandi koma Grønanes og Vesturtúgvan inn at landa mánadagin

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Hósmorgunin landaðu vestmenningar Vesturbúgvan. Teir høvdu fult skip, 200.000 pund av upsa og eini 10.000-20.000 pund av øðrum fiskasløgum.

Vesturbúgvin partrolar við Eysturbúgvanum, sum plagar at landa á Sandi, og teir høvdu eisini fult skip.

Í Vestmanna siga tey, at upsin var góður, mest 1'arar og 2'arar.

**Royndu á Suðuroyarbankanum**

- Men óvanliga góður var fiskurin hjá Vestmenningi og Fram, sum landaðuher mánadagin. Teir høvdu 260.000 pund av upsa umframt smærri nøgdir av øðrum fiskasløgum, siga tey í Vestmanna.Sum skilst, royndu Vestmenningur og Fram hendan túrin á Suðuroyarbankanum.

Í Vestmanna rokna tey við, at Grønanes og Vesturtúgvan koma inn at landa mánadagin, og helst endar upsin hjá Grønanesi í Vestmanna.

## Miðvingar keyptu fisk frá fýra línuskipum

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Síðan fríggjadagin í síðstu viku, hevur Fiskavirking í Miðvági keypt fisk frá fýra línuskipum.

Leygardagin landaði Eysturoyingur í Miðvági; teir høvdu um 100.000 pund. Mánadagin í hesi vikuni landaði Fugltúgvan; teir høvdu somuleiðis um 100.000 pund, og týsdagin var Sigmundur við stívliga 150.000 pundum, sum var ein rættiliga góður túrur. Aftrat hesum, keypti Fiskavirking í Miðvági hýsuna hjá Ågot, sum landaði í Klaksvík síðsta fríggjadag. Fiskavirking á Toftum keypti toskin. Ågot hevði umleið 100.000 tilsamans.

Í Miðvági siga tey, at veiðan hjá línubátunum er hýsa og toskur, kanska er størri helmingurin hýsa. Nakað er av øðrum fiskasløgum.



BENETTON

# STÓR ÚTSØLA

## Byrjar mánadagin 21. januar kl. 08.00

## -30% -40% -50%

UNITED COLORS OF BENETTON.

Sverrisgøta 17 • 100-Tórshavn • Tel. 317661